# Oyndarfjørður verður altíð Oyndarfjørður

**- Eg ivist ikki í, at vit leggja saman. Men hvørjum lagt verður saman við, kemur bygdarfólkið sjálvt at taka støðu til, sigur bygdarráðsformaðurin í Oyndarfirði, Árni Joensen**

FÓLKAATKVØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Dagurin er ikki endaliga ásettur enn, men einaferð seint í november fer bygdarfólkið í Oyndarfjarðar kommunu, sum hevur verið sjálvstøðug kommuna síðan 1918, at taka støðu til tveir ella tríggjar spurningar.

- Møguleikarnir eru trinnir, sigur bygdarráðsformaðurin, Árni Joensen, sum í sínum dagliga starvi selir fisk fyri P/F Vesturvón í einum húsum, sum standa í gomlu bygdini í Oyndarfirði.



*- Vit hava gott samstarv, bæði við Fuglafjarðar kommunu og Runavíkar kommunu, og sjálvur ivist eg onga løtu í, at vit í eini samanlegging kundu bygt upp eitt gott og gevandi samstarv, sigur Árni Joensen, bygdarráðsformaður í Oyndarfirði.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Týðandi mál

Hósmorgunin, tá ið Sosialurin hugdi fram við, hevði Árni sitið á skrivstovu síni síðan kl. 07.

Árni sigur, at bæði hann sum formaður í kommununi, hinir fýra bygdarráðslimirnir og fólk í Oyndarfirði annars, taka hesa vegleiðandi fólkaatkvøðuna ógvuliga avslappað, sum hann tekur til.

- Ikki tí; hetta er eitt ógvuliga týðandi mál fyri kommununa. Uttan samanlegging, verður torført hjá Oyndarfjarðar kommunu at røkja tær uppgávur, sum longu eru lagdar og verða lagdar út til kommunurnar at umsita.

Bygdarráðsformaðurin vísir á, at Oyndarfjørður er á einum vegamóti, og møguleikarnir eru trinnir.

- Vit kunnu velja at leggja saman við Fuglafjarða kommunu ella Runavíkar kommunu. Hin triðji møguleikin er, at Oyndarfjørður verður verandi ein sjálvstøðug kommuna.

## Fólkið avger

Árni vil ikki alment geva til kennar, hvørja samanlegging hann mælir til, tí hetta er ein spurningur, sum bygdarfólkið sjálvt skal taka støðu til.

- Eg fari ikki at siga, hvat eg haldi vera ta bestu loysnina fyri kommununa, tí tað kann kanska ávirka tey fólk, sum skulu taka støðu til spurningin.

Enn veit hann ikki fyri vist, um tveir ella tríggir møguleikar verða at taka støðu til á atkvøðuseðlinum, men í øllum førum fáa veljararnir høvi at taka støðu til samanlegging við Fuglafjarða kommunu og Runavíkar kommunu.

- Um triðji møguleikin, at Oyndarfjarðar kommuna framhaldandi verður ein sjálvstøðug kommuna, eisini verður við, er ein spurningur, sum myndugleikarnir í Havn verða við til at avgera.

Árni sigur, at ein slík fólkaatkvøða altíð er vegleiðandi.

- Sambært kommunulógini kann bygdarráðið sjálvt avgera, um lagt verður saman ella ikki, men hann heldur, at tað hevði verið púrasta burtur við at lagt kommununa saman við aðrari kommunu ímóti vilja fólksins. So, tað verður ikki gjørt, leggur hann aftrat.

## Borgarafundur

Fyrst í oktober verður almennur borgarafundur í Oyndarfirði, har ymiskt tilfar verður lagt fram um fyrimunir og vansar við samanlegging.

- Á hesum fundi verður kunnað um, hvussu vit ímynda okkum, at eitt slíkt samstarv verður. Tá verður so eisini høvi hjá borgarunum at bera fram sína hugsan um hesi viðurskifti.

Árni sigur, at nógv tilfar fyriliggur í málinum, sum nú verður borið borgarunum til kunningar.

- Tilfarið byggir á, hvussu mett verður, at samstarvið verður, antin lagt verður saman við Fuglafjarðar kommunu ella Runavíkar kommunu.

Hann sigur, at báðar hesar stóru kommunurnar hava nógv at bjóða og ivast ikki í, at antin samanleggingin verður við hesa ella hina, kemur eitt slíkt samstarv at tæna borgarunum í báðum kommununum.

- Vit hava gott samstarv, bæði við Fuglafjarðar kommunu og Runavíkar kommunu, og sjálvur ivist eg onga løtu í, at vit í eini samanlegging kundu bygt upp eitt gott og gevandi samstarv.

Árni sigur, at hann dugir ikki at meta um, hvørja støðu borgararnir í Oyndarfjarðar kommunu fara at taka í desember, men hann er rættiliga sannførdur um, at meiriluti verður fyri samanlegging.

- Sum bygdarráðsformaður kann eg liva við báðum møguleikunum, leggur hann aftrat.

## Nógvir møguleikar

Prátið fellir eisini á teir møguleikar, sum Oyndarfjørður hevur saman við Fuglafjarðar kommunu og Runavíkar kommunu.

- Sum er, hava vit sama skrivara sum Fuglafjarðar kommuna, og vit samstarva um tað tekniska, men tekniski parturin byggir á konsulentbasis.

Árni vísir á, at Oyndarfjarðar kommuna og Fuglafjarðar kommuna liggja uppat hvørji aðrari, og tá ið tunnilin kemur, verður eingin teinur úr Oyndarfirði til Fuglafjarðar – og stuttur teinur til Klaksvíkar, har vit hava sjúkrahús og stovnar.

Hann sigur, at Runavíkar kommuna eisini hevur sínar fyrimunir, hóast teinurin út hagar er longri.

- Runavíkar kommuna er ein størri kommuna, og har hava vit eitt nú heilsumiðstøð, apotek og fleiri stovnar, sigur Árni.

## Dýrt at reka

Árni vísir á, at tað er tungt at reka tær smáu kommunurnar, nú so nógv økir eru og verða løgd út til kommunurnar at umsita. Haraftrat kemur so, at Oyndarfjarðar kommuna hevur stórar rentuútreiðslur at dragast við, serliga av havnalagnum, sum í sínari tíð varð bygt.

- Av skattainntøkuni í kommununi, sum liggur um 4 milj. krónur um árið, rinda vit 1,5 milj. krónur í rentum og avdráttum. Hetta er heili 38% av inntøkugrundarlagnum. Aðrir postar, sum kommunan hevur, eru tilsamans eisini tungir at bera, tá ið fólkagrundarlagið er so lítið, sigur Árni Joensen at enda.



*Síðan 1918 hevur Oyndarfjørður verið sjálvstøðug kommuna. - Hóast vit leggja saman, fara bygdin og navnið, Oyndarfjørður, ongan veg, sigur Árni Joensen.*
*Mynd: Árni Joensen*



Læknastjórin á Landssjúkrahúsinum:

# Bill Justinussen hevur mist álitið á mær



*– Landsstýrismaðurin hevur mist álitið á mær og so kann eg ikki verða sitandi í starvinum, sigur Anne Grete Mikkelsen, læknastjóri á Landssjúkrahúsinum*

**– Orsøkin til at eg sigi upp er ikki tann, at nakrir yvirlæknar hava klagað um leiðsluna á Landssjúkrahúsinum. Orsøkin er, at Landsstýrismaðurin hevur mist álitið á mær, sigur Anne Grete Mikkelsen**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Einaferð enn mugu vit ásanna, at tað er heitt at sita á ovastu rók á Landssjúkrahúsinum.

Leiðararnir á okkara høvuðssjúkrahúsi skifta líka skjótt sum landsstýrisfólkini í mentamálaráðnum og tað sigur ikki so lítið.

Og nú hevur aftur ein leiðari á Landssjúkrahúsinum sagt upp.

Læknastjórin, Anne Grete Mikkelsen, hevur sagt upp og hon fer úr starvi longu 1. oktober. Hon segði seg annars úr starvið frá 1. desember at rokna, men partarnir eru samdir um, at hon kann fara 30. september.

Í Útvarpinum mikukvøldið varð sagt, at tað helst var ein klaga frá yvirlæknunum á Landssjúkrahúsinum, sum hevði fingið bikarið at flóta yvir.

Men hetta avsannar læknastjórin!

Orsøkin til hon segði upp, er ikki tann, at nakrir yvirlæknar skurðdeildini hava klagað um sjúkrahúsleiðsluna.

Orsøkin til, at hon hevur sagt upp, er at Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, hevur mist álitið á hana.

Tað sigur hon í eini stuttari viðmerking til uppsøgnina.

Og hon leggur afturat, at hon heldur ikki, at hon kann sita í einum slíkum starvi sum læknastjóri á Landssjúkrahúsinum, tá ið ráðharrin hevur mist álitið á henni .

Annars hevur hon ongar viðmerkingar til uppsagnina yvirhøvur.

## Loysti ikki trupulleikan

Sostatt má ásannast, at tað ikki hevur loyst samstarvstrupulleikarnar á Landssjúkrahúsinum, at ein nýggjur leiðslubygnaður varð gjørdur.

Samstarvstrupulleikar av ymsum slagi hava gjøgnumsúrgað arbeiðið á okkara høvuðssjúkrahúsið í fleiri ár, men vónirnar vórðu settar til, at tann nýggi leiðslubygnaðurin, sum varð settur í verk fyri nøkrum fáum árum síðani, fór at loysa trupulleikan.

Tað nýggja við hesum leiðslubygnaðinum, er, at talan er um eina trýbýtta leiðslu við einum læknastjóra og einum sjúkrarøktarfrøðiligum stjóra á jøvnum føti, men við einum sjúkrahúsleiðara yvir sær.

Men hetta bleiv heldur ikki lukkan. Fyrst segði ein leiðandi yvirlækni, Jóan Petur Davidsen, seg úr starvi og nú er læknastjórin so farin sama veg.

## Samd um at hon skal fara

Bill Justinussen, landsstýrismaður, sigur, at Anne Grete Mikkelsen vildi sjálv sleppa frá.

Men hann hevur ongar viðmerkingar til uppsøgnina.

– Av tí at talan er um eitt persónsmál, geri eg ikki viðmerkingar til smálutir í málinum, sigur landsstýrismaðurin.

Vit spurdu eisini landsstýrismannin um hann hevur havt varhugan av, at samstarvstrupulleikar hava verið, men eg havi ongar viðmerkingar.

Hann heldur tó fyri, at tað vísir seg, at vera eitt rættiliga ómøguligt starv at vera í leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.

Fyribils verður tað Petur Ellefsen, sum fer at røkja starvið sum læknastjóri.

Bill Justinussen sigur, at hann verður sitandi ímeðan tey umhugsa støðuna og finna út av, hvat skal gerast.

